# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Til minnis um Albert Mortensen á Argjum

*Tú vaks upp mitt í bygdini á Argjum*
*á Høvdanum gamla har vøgga tín stóð*
*har hoyrdi sum piltur tú duni frá sjóð*
*tá móður teg trygt hevði lagt*
*stóð Argjahøvdi í lannerings briminum vakt*

*Tú var løgfrøðingur, hugsjónarmaður,*
*listamaður, spakførur og vinsælur*
*lívið kann geva mong høgg*
*yvir hvørjum tindi er róð*
*handan fjøll tann æviga sól*

*Hvíl í frið í fosturlandsjørð*
*eg drýpi høvur í tøgn*
*Jesus verið hjá tær!*
*æra verið minni títt*

**Viggo Olsen**

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Sjálvur andin vitnar saman við anda okkara, at vit eru Guds børn*

*Róm. 8,16*

Hvítusunnan er andans hátíð. Andin kemur yvir ápostlarnar. Men vit trúgva sum kristin, at andin altíð er har, orðið verður boðað og har sakramentini verða býtt út. Gud er við øðrum orðum okkara millum. Hann er har menniskju koma saman í kristna felagsskapinum.Vit hava andan í okkum og millum okkum. Og andans uppgáva er at gera boðskapin livandi og viðkomandi hvørja ferð hann ljóðar. Uttan andan er orðið deytt og óviðkomandi, tað er mannaorð. Men tá andin kemur aftrat orðinum gerst tað livandi, tað gerst Guds orð. Tað er hetta hvítusunnan merkir.

Andin ger okkum kristnu heil og sonn, ger okkum til sonn vitnir fyri øðrum. Vit gerast av sonnum kærleikans umboðsmenn og kvinnur. Ja, vit kunnu siga, at andin ger, at kristna trúgvin fær týdning fyri okkum, sigur okkum nakað og gerst tað, vit liva og doyggja í. Vit kunnu ikki sjálv geva okkum trúgv og vit kunnu ikki gera kristna boðskapin viðkomandi fyri okkum.

Tað megnar bara andin og tað vil siga, bara Gud. Soleiðis kunnu vit siga, at trúgv er gáva, tað er givið at trúgva. Trúgvin og kærleikin spíra framí hinum kristna felagsskapinum. Trúgvin kemur av at hoyra, sum Paulus ápostul sigur. So fáa vit kraft og megi og inspiratión til at liva kærleikans lív í heiminum, tá orðið um hitt góða ljóðar. vit fáa andans kraft til at verða salt og ljós, ein sannur kristin bæði í orði og verki. Hvør dagur er ein nýggj avbjóðing, ein nýggjur møguleiki at liva lívið saman við Gudi í trúgv og saman við næsta okkara í kærleika. Bara andin kann hjálpa okkum til hesa trúgv og til hesa kærleikans tænastu. Tað sigur hvítusunnuboðskapurin okkum.

**David Johannesen, prestur**

## Astri Luihn í Listaskálanum

**Hósdagin læt Astri Luihn upp eina listaframsýning í Listaskálanum í Havn. Hetta er fjórða stakframsýning, hon hevur í Føroyum**

Malan Marnersdóttir professari læt framsýningina upp, og Petra Iversen sang á móttøkuni.

Á Framsýningini eru 44 málningar, ið eru gjørdir á linoleumsplátur, har hon sker, málar og nýtir ymiskan grafiskan teknikk í eini og somu mynd.

Astri sigur um málningarnar á framsýningini: "Eg ynski at skapa eina megnandi megi í einum kvirrum heimi við at leita inneftir – eina glaskenda avdúking av rúmi og tíð - myndirnar eru niðursjóðingar av teknum, upplivingum uttan um okkum og innan í mær"

Framsýningin er opin til 18 juli.



*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Gríma: NOT KABARETT

**2. Hvítusunnudag 31. mai kl. 20.00 hevur Leikhúsið Gríma premieru á Not Kabarett**

SJÓNLEIKUR



Tá ið tað ferð eftir ferð er staðfest, at tað, sum selir mest í Føroyum eru sex og porno, skandalir og religiøsir sangleikir, so mugu vit heldur ávara tykkum um, at eingin av hesum omanfyri nevndu kategorium eru við í Not Kabarettini, sum Leikhúsið Gríma í næstum fer at sýna fram.

Soleiðis sigur Leikhúsið Gríma í tíðindaskrivi um leikin, sum verður frumframførdur annan hvítusunnudag.

Tey siga, at okkara transvestittar eru bæði hampuligir/ar og siðiligir/ar, og tankalesarin ansar væl eftir, at innastu forbodnu tankarnir ikki koma fram - idioturin er slett ikki so býttur sum hann sær út til - og purrivøtturin er slett og aldeilis einki farligur.

Hetta er *ikki* ein Ólavsvøku-kabarett, hon kemur ikki fyrr enn tá, *men* hetta er heldur ein »á-veg-í-býin-kabarett« til eitt og hvørt hugnaligt hóskvølds-fríggja-leygar- og sunnukvølds-høvið.

Spælt verður klokkan 20:00 hóskvøld og sunnukvøld - men fríggjakvøld og leygarkvøld verður spælt klokkan 22:00. Kostnaðurin er 125.

Við hesum verið vælkomin á Not-Kabarett. Og góða skemtunn, heilsa tey úr Grímu.

**el**

### 80 ár

Mikudagin 2. juni fyllir Marita Pállsdóttir Mohr 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Lágargarði millum kl. 16.00 og 19.00.

### Gullbrúdleyp

Marianna og Leif Nolsøe í Sørvági hava gullbrúdleyp 2. hvítusunnudag, 31. mai, og verða tey hendan dag frá kl. 17.00 seinnapart stødd hjá synunum uppi í Húsadali, har vitjandi eru vælkomin at heilsa upp á tey.

### Brúdleyp

22. mai *giftust* í Dómkirkjuuni Guðrun av Reyni, Tórshavn, og Arthur Jakobsen, Runavík.

Í gjár, 28. mai, *giftust* í býráðssalinum í Havn Olina Eið Knudsen og Sigmar Djurhuus úr Porkeri.

Í dag, 29. mai, kl. 15.00 giftast í Glyvra kirkju Randi Lamhauge Hansen, Glyvrar, og Ólavur Olguson, Klaksvík. Veitslan verður í kappróðrarneystinum á Glyvrum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Í dag, 29. mai, giftast í prestagarðinum í Lamba Gunn Johannesen, Runavík, og John Dávid Joensen, Leirvík. Døgurði verður fyri innbodnum á Sjómansheiminum í Runavík. Eftir kl. 20.00 er opið hús heima hjá Lyon og Jórun, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 29. mai, kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Oddbjørg Johansen, Runavík, og Kevin Chukwudi Ugwa, Nigeria. Veitslan verður fyri innbodnum í kantinuni hjá FJM, Fjøruvegur, Runavík.

### Silvurbrúdleyp

Mikudagin 2. juni hava Marjun og Erling Petersen, Klaksvík, verið gift í 25 ár. Vælkomst verður í KFUM&K leygardagin hin 29. mai frá kl. 18.00.

2. juni hava hjúnini Randi og Símun Petur Hjelm í Klaksvík silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í dag, 29. mai, í Skálanum frá kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.



# Látur og smyrsl á sjúkrahúsinum

**Gentufnis og látur er ikki tað fyrsta vit seta í samband sjúku og sjúkrahús. Men tá kvinnur, ið eru í stráluviðgerð fyri krabbamein, læra seg at leggja make-up saman við Elsu í Garði, hoyrist láturin langt út á gongina á landssjúkrahúsinum**

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Øll hava brúk fyri at flenna, og allar kvinnur vilja síggja gott út. Eisini tær, ið eru í stráluviðgerð fyri krabbamein. Fyri tað, um tær hava mist hár, eygnabrýr og vippur, hava tær ikki mist humørið ella hugin at síggja gott út. Á skeiðunum í andlitsrøkt fáa tær eitt skump tann rætta vegin og eina glaðari mynd av sær sjálvum í speglinum, sigur Elsa í Garði, vakurleikaserfrøðingur og sjúkrarøktarfrøðingur.

– Eg læri kvinnurnar at tekna natúrligar eygnabrýr og nýta røttu litirnar til at fáa eitt gott dæmi aftur. Tað finnast alskyns tricks, tú kanst nýta, soleiðis at ongin varnast, at nakað er øðrvísi, og sum fáa teg at síggja frískan út. Tú skalt bara hava røttu amboðini og læra at nýta tey. Tað er nýtt, spennandi og stuttligt, og vit hava hvørki tíð ella hug at tosa um sjúkur. Størsta avbjóðingin hjá okkum er oftast at at halda penslum og stiftum beint, meðan vit flenna í kíki, sigur Elsa í Garði, sum er lærari á skeiðnum.



*- Tað skal ikki bara vera trist og keðiligt at koma á landssjúkrahúsið. Tí hava vit valt at hava skeiðini í at leggja make-up har, sigur Elsa í Garði, vakurleikaserfrøðingur og skeiðshaldari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Útsjónd og sjálvsvirði

Í flestu førum setur stráluviðgerð rættiliga sjónlig spor á útsjóndina. Húðin fær ein grá/gulan lit, og hárvøksturin hvørvur sum oftast. Hetta hendir sjálvsagt bæði hjá kvinnum og monnum, men royndir vísa, at nýggja spegilsmyndin órógvar kvinnur nógv meir enn menn. Tí hevur Føroya Felag Móti Krabbameini seinastu tvey árini skipað fyri skeiðum í andlitsrøkt fyri kvinnum í stráluviðgerð.

– Øll vita, hvussu stóran týdning útsjóndin hevur fyri okkara sjálvsvirði. Og øll hava vit okkara lýti, sum vit læra at káma, so tey ikki eru so sjónlig, ella vit venja okkum við tey við aldrinum. Men fært tú stráluviðgerð fyri krabbamein, hendir broytingin í útsjóndini knappliga og ofta ógvusliga.

Serliga kvinnur hava ofta ilt við at góðtaka at tær missa hárið og gráa andlitslitin, sum fylgir við. Hetta ávirkar teirra sjálvsvirði, so at tær helst bara vilja goyma seg og sleppa undan yvirhøvur at fara út ímillum onnur fólk. Og tað oyðileggur sjálvandi eisini lívsgóðskuna í síðsta enda, sigur Elsa

### Lívsgóðska

– Hetta snýr seg jú ikki bara um útsjónd og sjálvsvirði. Ein kvinna, sum hvønn dag sær eina sjúka andlitsmynd í speglinum, kennir seg ofta nógv meir sjúka, enn hon í veruleikanum er. Í ringasta føri kann tað hava við sær, at hon missir móti um nakrantíð at gerast frísk aftur. Onnur fólk fara eisini øðrvísi við fólkum, sum síggja beinleiðis sjúk út. Tey vita ikki, hvat tey skulu siga, og ansa væl eftir ikki at siga nakað um útsjóndina. Og tað ávirkar sjálvandi allan stemmningin og mátan, arbeiðsfelagaðar ella avvarðandi eru saman við tí sjúka, sigur Elsa.

### Samskifti

Elsa í Garði er eisini sjúkrarøktarfrøðingur, og tað heldur hon vera ein avgjørdan fyrimun, tá hon hevur skeið við kvinnum, sum fáa stráluviðgerð.

– Eg havi sjálv arbeitt sum sjúkrarøktarfrøðingur á krabbameinsdeildum, so eg veit, hvat nívir hesar kvinnur, og hvussu tosið gongur millum tær, tá tað ræður um útsjóndina. Flestu kvinnur halda seg hava okkurt lýti við síni útsjónd, sum tær ikki eru so fegnar at práta um við hvønn sum helst, sjálvt um tað snýr seg um okkurt heilt vanligt. Hjá kvinnum, sum fáa stráluviðgerð, kemur sjúkan afturat, og tað fær tær ofta at kenna seg einsamallar við tí, tær halda misprýðir tær. Sjálvandi ynskja tær eisini at deila sínar tankar við onkran, men tað er ikki altíð tær tora.

– Eg havi sæð so nógvar kvinnur, sum fáa stráluviðgerð, so eg verði hvørki kløkk ella illa við, tá tær til dømis taka parykkin av. Eg eri jú eisini von við at nerta við sjúk fólk, og eg trúgvi, at kvinnurnar merkja, at eg taki tað púra avslappað. Og hetta hevur nógv at siga, tí skeiðini snúgva seg í veruleikanum minst líka nógv um gott samskiftið og at kenna seg tryggan, sum um smyrsl og litir, sigur Elsa.

### Look good – Feel Better.

Tað Føroya Felag Móti Krabbameini, sum við íblástri frá altjóða átakinum Look Good - Feel Better, skipar fyri skeiðnum, sum er ókeypis.

Look Good - Feel Better skeiðini byrjaðu í Onglandi í 1989. Aðrastaðni verða tey sponsorerað av sminkufyritøkum, soleiðis at skeiðini eru ókeypis, og kvinnurnar kunnu fáa eina tasku við øllum teimum tørvar til dagliga andlitsrøkt heim við. Innihaldið í taskuni hevur eitt virði á ein 2-3000 kr, men so stóra gávu hevur felagið ikki ráð at lata føroysku kvinnunum. Tær fáa tó ein sminkupung við varrastift, mascara og eygnablýanti.

– Vit hava hava fingið stuðul ymsa staðni frá, men peningurin røkkur ikki so langt, sum vit vildu ynskt. Aðrastaðni verða slík skeið hildin 14. hvønn dag, men vit hava bert ráð at halda tey umleið 3 til 4 ferðir um árið. Tí er tað sjálvandi mark fyri, hvussu nógvar kvinnur fáa gleði av hesum. Men vit royna allatíðina at søkja stuðul, og vóna tað besta. Fyribils kunnu vit í øllum førum fegnast um, hvussu stóra gleði, kvinnurnar, sum hava verið á skeið, hava havt av tí, sigur Jansy Gaardlykke, samskipari í Føroya Felag Móti Krabbameini.

Næsta skeiðið verður komandi mikudag í Gestaborðstovuni á Landssjúkrahúsinum kl. 14.00.

## Loppumarknaður fyri eldri

Áhugabólkurin fyri eldri í norðoyggjum fer at skipa fyri loppumarknaði, kaffisølu og køkutombola tann 12. juni. Í tí sambandi við loppumarknaðin vilja tey heita á fólk um at lata lutir. Tað kann vera alt frá klæðum til leikur og møblum til postalín, siga tey úr áhugabólkinum.

– Vit taka í móti lutum í kjallaranum á sambýlinum á Heygnum týsdagin 1. juni frá klokkan 19 til 21.

Tey, sum hava lutir at lata, men ikki hava møguleika at koma við teimum sjálvi, kunnu seta seg í samband við Mariu Klein á tlf 455383 ella Gerdu Absalonsen á tlf 455174 ella 455164.

**-sae-**